# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# DÁLKA OKKUM GRINDINA BURTUR

So upplivdu vit tað, at ein sokallaður umhvørvisfelagsskapur leggur okkum føroyingar undir at velja Sátan fram um Gud, tí vit drepa grind. Jú, mangt skalt tú hoyra...

Til eitt vist kunnu vit skilja, at fólk úti í stóru verð halda okkum vera barbarar, tí vit drepa grind. Men hetta man vera eitt gott dømi um, hvussu lítið sokallað globaliserað fólk skilja av tí heila. Almenna heimasíðan hjá Sea Shepherd visti nú um dagarnar at siga um grindadrápið í Vestmanna hósdagin. Har speireka tey føroyingar, sum siga, at grindin er ein gáva frá Gudi:

*»Tann einasti gudur, sum kann góðtaka slíka rœðslu er Satan, og Føroyar tykjast tœna sínum ónda gudi við sínum drápsliga hugburði og við at verja eina barbariska mentan, sum einki pláss eigur í 21. øld, sum ikki hoyrir heima í siviliseraða heiminum, og sum als einki pláss eigur í Evropasamveldinum«*, skrivar Sea Shepherd millum annað á heimasíðuni.

Jú so víst er tað í nógv størstan mun talan um glantrileik í umhvørvisfelagsskapum so sum Sea Shepherd. Tað gongur jú út upp á, at ávísir persónar skulu kunna uppihalda einum lívsstíli, har teir kunnu spegla sær í glamour og vinna pengar upp á lættsintar umhvørvisfjepparar, sum geva teimum gávur fyri at berjast móti til dømis blóðdálkandi og óndum føroyingum.

At grindadrápið fer í søguna tykist alt meira greitt. Ikki tí at vit skulu bukka undir fyri trýsti frá umhvørvisfelagsskapum, men tá almennu heilsumyndugleikarnar mæla frá, at fólk yvirhøvur eta grind, so hevur politiski myndugleikin ein álvarsaman trupulleika við at loyva fólki at drepa og eta grind. Tað er so í øllum førum at blæsa og hava mjøl í munninum, og her verður politiska skipanin skjótt noydd at taka støðu – heldur enn at halda fyri eygu og oyru og halda seg vita betur.

Nú fekk Kári á Rógvi, løgtingsmaður, rættiliga oyrini í maskinuna, tá hann speirak ein týskara við Auswich í sambandi við herferð móti grindadrápi. Nei sjálvandi kunnu dagsins týskarar ikki gera við, at for-



fedrarnir vóru slíkir barbarar ímóti mannaættini. Men tað átti ikki verið so trupult at vent sjútsinum og gjørt hesum fólkum greitt, at vit ikki halda, at tað ikki sømir seg tjóðum, sum tína mannalív, at finnast at okkum fyri okkara grindadráp.

Støðan er jú heilt margháttlig, tá mannatýnarar finnast at hvalatýnarum – og so koma fleiri teirra úr somu londum, sum hava dálkað okkum sjóøkið so illa, at grindin ikki er etandi.

Grindadrápið fer helst í søguna. Men tað verður ikki tí, at »barbararnir« í Føroyum ikki koma sær at drepa hesi fittu og klóku djór. Grindadrápið fer helst í søguna, tí at barbararnir á meginlandinum hava dálkað okkum umhvørvið so illa, at grind ikki er etandi.

**» Marghátlligt, at mannatýnarar finnast at hvalatýnarum**



# »Ein ferð gjøgnum føroyskt«

Í Sankta Frans skúla í Havn høvdu tey herfyri evnisviku, sum tey kallaðu eina ferð gjøgnum føroyskt. Í hesum sambandi vitjaðu næmingar úr 3. og 4. flokki í Miðlahúsinum.

Tey vildu fegin síggja, hvussu vit gera bløð, skriva Portalin og gera útvarp í Miðlahúsinum. Tey hava eisini havt rithøvundar á vitjan í skúlanum, sum hava greitt frá um tað at skriva søgur og yrkingar og um sagnir og ævintýr.

Tey hava eisini kannað standmyndir ymsa staðni í Havnin. Ja, tey vóru fegin um hendan øðrvísi mátan at hava undirvísing.

# Gjørdi Jørgen ein Jóannes?

Tað sær út sum um, at Jørgen Niclasen »gjørdi ein Jóannes«, tá Fólkaflokkurin tók seg úr samgonguni í síðstu viku.

»At gera ein Jóannes« er at fara úr eini samgongu, tí man roknar við nývali. Tað gjørdi Javnaðarflokkurin í 1996 – ivaleysur í, at Edmund Joensen fór at skriva út nýval. Men tað gjørdi hann ikki. Hann skipaði nýggja samgongu saman við Fólkaflokkinum, sum hevur sitið við valdið síðani.

Men Javnaðarflokkurin fór í eina oyðimarkargongd í andstøðu í næstan átta ár.

Tjóðveldisflokkurin skuldi eisini vera smartur í 2003, tá tey mistu álitið á Anfinni Kallsberg fyri bókhaldsfusk, sum hann í eini bók var lagdur undir at hava gjørt fyri eini 25 árum síðani. Tað endaði við nývali og at Tjóðveldisflokkurin fór sína oyðimarkargongd, sum hann hevur verið í síðani.

Kanska Fólkaflokkurin nú stendur fyri tørni...?



## » Vælferð ella niðurlaging

EYÐGUNN SAMUELSEN
KJAK Á SÍÐU 10



## » Sundstein spyr Kaj Leo

JÓGVAN SUNDSTEIN
KJAK Á SÍÐU 12

# Rýmdu undan rúsevnum



Leygarkvøldið vóru nakrar gentur av bygd farnar ein túr til Havnar at hungna sær. Tíðliga leygarkvøldið vóru tær bodnar í ein føðingardag.

Tá ið tær komu í føðingardagin løgdu tær til merkis, at hetta var ikki ein vanligur føðingardagur við lagkøku , bollum og kakao. Har vóru tað rúsevnir sum, settu dagskránna.

Tey flestu, sum vóru í føðingardegnum vóru rúsað við rúsevnum. Hetta var ikki nakað fyri bygdagenturnar, sum vit hava tosað við, so tær valdu heldur at fara ein túr oman á Hvonn at hugna sær.

– Her er tørvur á einum meira aktivum narkopoliti, halda genturnar.

Og tað undran mangan, hví rúsevni florera í Føroyum, tá ið øll kenna hvønn annan.

So tit, sum síggja rúsevni í veitslum og arðastaðni, sigið løgregluni frá. Tað nyttar ikki at vit fjala út yvir hvønn annan. Um vit øll í Føroyum standa saman um at útrudda rúsevni, so var eingi trupulleiki at gera slagorðið til álvara: Nei til narko!

Hetta skylda vit børnum okkara, sum eru í vandabólkinum fyri at koma út í slíkt misbrúk.

Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*